# HUGINUM BI

**VERKSTAÐ** Tað er vist eingin avgerð, at tá ein áður tosaði um runavíkingar, so tosaði ein samstundis um bilar. Um hetta hevur ávirkað tann 19 ára gamla, Werner Hentze úr Saltangará kann ein og hvør hugsa sær til. – Tja, eg veit ikki. Mær hevur altíð dámað væl at skrúva, sigur Werner sum í dag lærir til bilmekanikara




*– At arbeiða sum bilmekanikari er eitt spennandi arbeiði, sigur 19 ára gamli, Werner Hentze úr Saltangará, sum lærir til bilmekanikara í Klaksvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**» Eg lærdi faktist meiri her á verkstaðnum, enn í skúlanum**

**» Eg haldi, at vit hava tað bara fínt saman**



## Koplingin

**Mikudagin í farnu viku vitjaði Oyggjablaðið hjá Reyni Service í Klingrugarði í Klaksvík.**
**Teir á verkstaðnum kunnu á einum lista síggja, hvørja uppgávu teir skulu loysa henda dagin. Og tá er líkamikið um ein er lærlingur ella um ein er sveinur.**
**Henda mikudagin var Werner Hentze farin undir sína uppgávu, nevniliga at skifta koplingina á einum bili.**
**– Eg vænti at tað fer at taka restina av degnum. Tað satsi eg í øllum førum uppá, sigur hann.**
**Í morgin bíðar honum so tann næsta uppgávan.**

Snorri Brend

**Klaksvík:** Teir ídnu lærlingarnir inni í verkstaðnum hava allir úr at gera henda mikudagin í farnu viku.

Onkrir bilar standa á gólvinum, har teir standa við høvdinum niðri í motorrúminum fyri at umvæla tað, sum bilar í bilinum.

Við ein annan bil stendur Werner. Í hansara føri er bilurin lyftur upp, soleiðis at hann so lætt sum tilber sleppur framat at loysa dagsins uppgávu.

– Hetta dámar mær sera væl, sigur ungi maðurin av Skálafjørðinum, sum koyrir fram og aftur hvønn einasta dag.

Og hann leggur aftrat: - Nú eri eg akkurát byrjaður at læra her. Men enn veit eg ikki, hvat eg fari at gera, tá lærutíðin er liðug um trý og eitt hálvt ár.

Fyribils er líkt til, at honum dámar væl at arbeiða her hjá Toyota í Klaksvík.

Her sleppur hann í øllum førum at royna seg í øllum tí sum hevur við nærum allar bilar at gera.

### Dreingjadreymur

Hjá nógvum dreingjum er alt tað sum hevur við bilar og skrúvur at gera, vanliga eitt sum fyllir nógv í uppvøkstri og gerandisdegi teirra.

Mangir dreingir hava sum mál og sum dreym at gerast løgreglumenn, sløkkiliðsmenn, lastbilførarar og tílíkt, tá teir gerast menn.